## Jóannes Jakobsen um áskoðararnar:

– Tað vóru eini 1400 áskoðarar og hugdu at okkum í Landskrona. Mest føroysk lesandi í Danmark, og so nakrir sviiar. Vit bæði merktu og hoyrdu hesar, hóast tú vanliga á vøllinum ikki gevur tær far um tað, ið hendir uttanfyri. Og sum dysturin leið ljóðaðu hesi stívliga 1000 fólkini sum 10.000. Rein ekstasa tá vit høvdu skorað, og fólk sóu sensatiónina fyri framman. So áskoðararnir hava nógv at siga.



## ... um leiklutin sum liðformaður:

– Á mínum plássi hevði eg gott yvirlit yvir allan vøllin. So tað lá væl fyri at rópa og stýra. At informera leikarar, píska upp og vera positivur, men eisini senda nøkur dreparaeygu, tá tað var neyðugt. Annars var tað samskifti við venjarar og leikarar, og ikki minst fjølmiðlarnar. Eftir sigurin á Eysturríki var tað næstan eitt fulltíðarstarv í langa tíð aftaná.

# Latið atfinningar

**– Hevði eg verið landsliðsspælari í dag, so hevði eg verið reyvhamrandi troyttur av at hoyra gamlar landsliðsleikarar reypa, og fólk tosa um, at soleiðis var tað, tá vit vunnu í Landskrona. Tá er tað man skal fara út og sparka Eysturríki líka langt aftur, sum vit gjørdu tá, sigur Jóannes Jakobsen. Tí eins og nú, vóru eisini nógvar atfinningar at landsliðnum, og hesum vildu leikararnir gera til skammar. – Og tað eiga vit at gera aftur nú, heldur Jóannes Jakobsen, táverandi liðformaður**



## Samrøða



**Rólant Waag Dam**
blaðmaður
rolant@sosialurin.fo

Jóannes Jakobsen var liðformaður á føroyska landsliðnum, tá hetta skuldi royna seg á altjóða palli fyri fyrstu ferð. Heimavøllurin var í lítla býnum Landskrona í Svørríki, og føroyska liðið var mannað við totalum amatørum. Menn, sum vandu tríggjar ferðir um vikuna og spældu 18 dystir árliga.

Burtursæð frá Oyggjaleikunum, har støðið var langt frá nøktandi, var lítið og einki av avbjóðingum, ið føroyska fótbóltslandsliðið fekk. Jóannes Jakobsen sigur skemtiliga, at tað hægsta áðrenn Eysturríki, var hendinga landsdystur ímóti onkrum donskum oldboys landsliðið við áraknútum og hvat veit eg, sum hann tekur til, og so venjingardystir ímóti Íslandi viðhvørt.

– So hetta var av sonnum spildurnýtt, og vit vistu ikki heilt hvar vit flutu, sigur Jóannes Jakobsen, sum í dag er fastur fótbóltsviðmerkjari í Útvarpinum hjá Kringvarpinum, og annars hevur verið venjari hjá fleiri Formula-liðum.

### Keðilig upptakt

Fólk vóru skeptisk yvir føroysku luttøkuna í altjóða fótbólti. Ikki bara úti í heimi, tí eisini í Føroyum vóru fleiri ímóti, at Føroyar luttóku í undankappingum til endaspøl.

Hjá Jóannes Jakobsen persónliga var upptaktin langt frá optimal. Hann hevði verið nógv plágaður av bruna í hælsinuni, og kropsliga var hann langt frá toppinum.

– Tað varð soleiðis um hetta mundi, at antin spældi eg dystir, ella vandi eg. Eg kundi ikki bæði. Og spældi eg ein dyst, so var eg ikki gonguførur í tveir dagar aftaná. Men tað er ikki altíð, at tað eru beinini, sum eru avgerandi fyri ein leikara. Mentala styrkin er minst líka umráðandi, sigur Jóannes Jakobsen og leggur so flennandi aftrat.

– So mín uppgáva var í stóran mun at renna minni, men tosa meiri enn hinir leikararnir.

### Róligir hóast brøl

Sambært Jóannes Jakobsen tóku menn tað heilt róligt undan dystinum. Venjarin hevði gjørt eitt stórt fyrireikingararbeiði, og liðið hevði verið á venjingarlegu.

– Sjálvandi vóru nakrir “spilopmagarar” við, men á sjálvum dystardegnum vóru vit fokuseraðir, sigur Jóannes Jakobsen og heldur áfram.

– Menn óttaðist ikki uppgávuna, so har var eingin, ið pissaði í buks. Vit vóru róligir og avbalanseraðir. Undan dystinum gingu vit út á sjálvan vøllin, og hann var heilt fantastiskur. Eingin okkara hevði spælt á so góðum vølli áður, og tað var enn ein motivatiónsfaktorur, greiðir Jóannes Jakobsen frá.

Hóast róligir og avbalanseraðir, sum Jóannes Jakobsen tekur